Tiltøk

Hebron á Argjum
Mikudagur 6. apríl
Kl. 10: Bønarløta fyri kvinnur
Kl. 20: Húsbólkar – tí einki møti í Hebron
Fríggjadagur 8. apríl
Kl. 10: Bønarløta fyri kvinnur og menn
Sunnudagur 10. apríl
Kl. 10.30: Morgunmøti
Kl. 12.00: Sunnudagsskúli og møti. Á møtinum talar Benjamin Hansen
Kl. 18.00. Evangeliskt møti
Kl. 20.00: Ungdómsbólkur
Mánadagur 11. apríl
Kl. 19: Mansløta v/ Páll Poulsen
Hjartaliga vælkomin í Hebron

Lívdin í skúlanum við Løgmannabreyt
Leygarkvøldið 9. apríl
Alive ungdómsmøti kl. 21.00. Símun Absalonsen talar um "Hin góði hirðin."
Sunnudagur 10. apríl
Familju- og tilbiðjanarmøtið byrjar kl. 10:30, og lovsongur og tala kl. 12:00.
Á familjumøtinum verður myndarød um Jónu Gunnarson. Absalon Áargarð skipar fyri.
Á seinna møtinum, sum er kl. 12, talar Jógvan Zacharissen, evnið er:
"Rómbrævið 15:22-23 - Longsulin at koma til Róm."
Meðan seinna møtið er kl. 12, verður barnaansing, sunnudagsskúli og UngLív.
Hjartaliga vælkomin.

Samkoman Marknagil Fjalsg. 2, Tórshavn
Mánakvøldið kl. 20 Bønar/ uppbyggingarmøti.
Verið hjartaliga vælkomin

Aglow Tórshavn
Møti verður í hølunum hjá Frelsunarherinum leygarkvøldið 9. apríl kl 19:30.
Monika Kunoy Sharp talar.
Allar gentur og kvinnur eru vælkomnar.

Fríkirkjan Oasan
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti. Verið hjartaliga vælkominwww.oasan.fo

Evangeliihúsið, Tróndargøta
Mánakvøldið kl 20 Lovsangs- og bønarløta. Mikukvøldið kl 18 Vit koma saman.
Hóskvøldið kl 18 Mini Salt. Sunnudagin kl 11 Ungdómsvælsignilsi.
www.gospel.fo

Tórshavnar Hvítusunnusamkoman
Møti verður sunnukvøld kl. 18. Øll eru vælkomin.

Frá Meinigheitshúsinum í Havn
Mánadagur kl. 19.00 Junior møti
Manadagur kl. 21.00 Mørt Input fyre tey eldru ungu
Týsdagur kl. 20.00
Bíbliutími v/Tom Skaale Opinberingin 4.
Mikudagur kl. 20.00 Felsgs kóri venur
Hóskvøldið kl. 19.30
Hjúnarbandi V/ Sten Palmqvist
Hósdagur kl, 20.00
Ungdómsmøti v/Jóhan Henriksen
Sunnudagur kl. 14.00
Sunnudagsskúli Skipa vrðue fyre singe við degi
Sunnudagur kl 18.00 Møti v/ Gunnar Reynslág
Sangur Menigheitskóri
Øll eru hjartalia vælkomin

Filadelfia Tórshavn
Mánadagin kl. 20.00
Bønarskúlin
Mikudagin kl. 16.30 Bøn fyri Ísrael og býnum
kl. 18.00 Delli, børn frá 3. til 6. flokk
Fríggjadagin kl. 20.00
Mammur hittast til bøn,
kl. 21.00 Flare
Sunnudagin kl. 11.00 Felagsmøti í Evangeliihúsinum, ungdóms signing

30 ára hald í Immanuel
Ungdómsarbeiðið í Samkomuni Immanuel hevur í hesum døgum 30 ár á baki; í hesum sambandi verður skipað fyri einum 30ára haldi fríggjakvøldið 1. apríl kl. 20. Á skránni er sangur, myndir á stórskyggja frá hesum 30 ára skeiði, ungdómsleiðarar hugleiða afturvið kaffi og køkum. Øll, ið hava verið partur av ungdómsbólkinum í longri ella stytri tíð hesi 30 árini, eru hjartaliga
vælkomin til hugnakvøldið.
Samkoman Immanuel heldur til í Brekkutúni 5, Hoyvík.

Sandavág
Sjómanskvinnuringurin kemur saman í Meinigheitshúsinum týskvøldið 5. apríl kl. 20.
Burturluting. Mint verður á pakkarnar. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar

Saron, Vestmanna
Týskvøldið Kl. 19.00 andakt í eldrasambýlinum.
Hóskvøldið Kl. 18.30 frítíðararbeiði í Saron.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Kollafjarðar Missiónshús
Mánakvøldið verður juniorhugni kl. 19.30.
Týskvøldið verður bønarløta kl. 19.30 og bíbiltími kl. 20 v/ Hans Paula Højgaard.
Øll eru hjartaliga vælkomin
Sjómannskvinnuringurin kemur saman hóskvøldið 7 apríl kl. 20:00.
Allar kvinnur eru vælkomnar

Miðvágs Missiónshús
Sjómanskvinnuringurin kemur saman mikukvøldið 6 apríl kl. 20.
Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

Kirkju- og missiónshúsið á Eiði
Í kvøld kl. 20: Katekismusgudstænasta.
Evni: Kingo - sálmar frá Slangerup v/ Anne Mette Klemensen.
Týskvøldið kl. 20: Katekismusgudstænasta.
Evni: Dópsupplæring - kristindómsundirvísing v/ Bergtóri Bjarkhamar.
Mikukvøldiðkl. 20: Katekismusgudstænasta / føstugudstænasta.
Evni: Bøn í Jesu navni - Guds vilji v/ Emil Olsen.
MØTI Í KARMEL
Hóskvøldið kl. 20: Møti við John Myllhamar, trúboðara. Glyvra streingjakór syngur.
Fríggjakvøldiáð kl. 20: Møti við ungfólki úr Tórshavn - sangur / tónleikur.
leygarkvøldið kl. 20: Møti við Gulakki og Jónhildu - sangur.
MESSA
10.04. Boðanardag Mariu kl. 12: Messa Emil Olsen.
FAMILJUMØTI I KARMEL
10.04. Boðanardag Mariu kl. 16: Familjumøti við luttøku úr Gøtu.

Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum
Týsdagin 5. apríl kl.19.00 hevur Glyvra streingjakór sang og andakt á Røktar- og Ellisheiminum í Runavík
Hósdagin 7. apríl kl. 18.00 Juniorarbeiði
Hósdagin 7. apríl kl 20.00 Bíbliutími, 1. kapitul í Opinberingini
Fríggjadagin 8. apríl kl 21.00 Náttarkirkja í Glyvra kirkju
Sunnudag 10. apríl kl 17.00 Møti v/ Hansy Skarðsá. Ung virka við.
Sunnudag 10. apríl kl. 17.00 Sunnudagskúli
Sí annars okkara heimasíðu glyvra.fo

Keldan, Skálafirði
Páskastevna verður í Kelduni frá skírishósdag 21. apríl til og við 2. páskadag 25. apríl.

Soli Deo Gloria
Mánakvøld kl 20.00 bønarmøti
Hóskvøld kl 20.00 Ungdómsmøti
Sunnudagin. Onki møti, vegna konfirmatión.

Getsemane, Klaksvík
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti v/ breyðbróting.

KFUM & K, Klaksvík
Mánakvøldið kl. 20 Sjómanskvinnuringurin samlast. Allar kvinnur vælkomnar.

Missiónshúsið í Skopun
Mánadagin kl. 17 barnaarbeiðið.
Týsdagin kl. 19.30 bønarløta.
Kl. 20 bíbliutími.
Hósdagin kl. 20 bindimøti.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Kl. 18 møti v/Petur og Ninu Poulsen.

Frelsunarherurin Vágur
Mánadagin kl 20.00 Bønarløta
Týsdagin kl 09.30 Orðið á borðið, kl 20.00 Heimaforbund
Fríggjadagin kl 09.30 Orðið á borðið

Missiónshúsið í Vági
Hvørt týskvøld kl. 20 er bønarmøti.

BERIN
Til børn og ung, ið hava mist foreldur ella systkin. Vit byrja nýggjar bólkar í Beranum í februar. Áhuga eru vælkomin at ringja til á tlf. 222993 ella maila til info@berin.fo.
www.berin.fo

Føroyskt Bretskt Felag haft aðalfund
Hesi eru í nevndini:
Knút Gray nyvaldur, Fanny Joensen, Merry Southerland Stenberg, Eyrith Guttesen Leyni og Anna Katrina Viderø.
Nevndin skipaði seg við Knút Gray sum formanni.

Pensionistafelagið í Havn
Tlf. 222733
finnurj@post.olivant.fo
Limirnir hittast í Losjuni.
Mikudagin 30. mars kl. 18 hevur felagið bingo í Losjuni.

Samuelskirkjuni
Tað er guðstænastur:
24. apríl kl. 14 - 1. mei kl. 14
15. mei kl. 14 - 5. juni kl. 14
19. juni kl. 14.

Losjan í Havn, Tinghúsvegur 18
Fríggjadagin kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

Tilhaldið Hugnin í Sandoy
hevur opið mánadag og mikudag frá kl. 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Calarasi Missiónin
Hjálp okkum at geva svongum børnum í Romenien eina heita máltíð um dagin. Konto í Eik: 9181 4252669
Bank Nordic: 6460 1618549
Takk fyri tín stuðul.

Frítíðarfelagið Antares
Áhugafelag hvørs endamál er at skapa samanhald og røkja áhugamál hjá teimum føroyingum, sum starvast í altjóða farma- og frálandavinnu. Vitja heimasíðu okkara á www.antares.fo ella send ein teldupost til antares.
njordur@gmail.com, fyri at fáa meira at vita um felagið.

Landsfelag Pensjónista
Tróndargøta 13, Tórshavn
Tlf. 319394 ella 219394
Skrivstovan er opin týsdag frá kl. 13 til 16.
landsfelagpensjonista@olivant.fo

Dagtilhaldið í Nólsoy
er opið mánadag, týsdag og hósdag frá kl. 13-17. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Dagtilhaldið í Runavíkar Kommunu
Vit halda til í húsinum hjá Nón á Torvgøtu 2, Saltangará. Opið er mánadag til hósdag frá kl. 14-17.
Høvi er at gera ymiskt handaligt arbeiði, spæla kort, boccia og onnur spøl. Týsdag er fimleikur/styrkivenjing. Bløðini eru til taks og ein góður drekkamuður. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Dagtilhaldið á Toftum
Opið er hesar dagar: týsdag, mikudag og hósdag frá kl. 15 til 18.
Øll eldri eru vælkomin

Dagtilhaldið í Fuglafirði
Opið er: Mánadag, týsdag og mikudag frá kl. 15-18.

Tilhaldið Sóljan
Klaksvíksvegur 35
Klaksvík · tlf. 459091
dagtilhaldid@post.olivant.fo
Opið er: Mánadag til hósdag kl. 13.30-17.30
Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks. Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a. Hvør dagur endar við andakt og sangi. Øll vælkomin.

Dagtilhaldið Blákollan á Oyri
Opið er týsdag og hósdag frá kl. 14-18. Øll eldri eru hjartaliga vælkomin.

Dagtilhaldið í Vági
Er opið týsdag og hósdag frá kl. 15-18. Øll eru vælkomin.

Vága Pensionistafelag
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Sofíu Haraldsen, tlf. 332741 ella nevndarlimunum.

Náttarravnarnir í Tórshavn
Tín stuðul ger mun!
Teknað teg sum náttarravn ella gang ein royndartúr. Ring tlf. 212498 Daisy, 274696 Barbara, 224048 Óluf.

Spælistovan
í Margarinufabrikkini. Opið er mánadag, týsdag og hósdag frá kl. 9-11.30 fyri børnum/ foreldrum uttan ansing.

Kvinnuhúsið
Skrivstovan er opin gerandisdagar frá kl. 10-17. Tlf. 317200 svarar alt samdøgrið.
www.kvinnuhusid.fo

Listasavnið á Sandi
Sands Listasavn er opið vetrarhálvuna sunnudag kl. 14-16. Bólkar o.o. sum vilja gera seravtalu um aðrar tíðir kunnu ringja á tel. 211924/ 361617 í góðari tíð frammanundan.

Vitjunarvinir
Um tú vilt verða vitjunarvinur hjá Reyða Krossi ring ella skriva til okkum:
Reyði Krossur Føroya
Bryggjubakki 10, Postsmoga 1015, 110 Tórshavn
Tlf. 319630. Fyriskiparar í Tórshavn, Eyrith tlf. 313784 og 513784 og Marin 314333 og 284333. www.redcross.fo

